# Operahjúnini bergtóku fjøldina

**Tey mongu fólkini, ið høvdu leitað sær í Norðurlandahúsið hóskvøldið at hoyra hjúnini Rúna og Susanne Brattaberg fingu eina framúr góða tónlistarliga uppliving**

LISTASTEVNAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Flestallir áhoyrarnir vóru á einum máli um, at talan hevði verið um eina fantastiska konsert, tá ið Rúni og Susanne Brattaberg saman við Føroya Symfoniorkestri undir leiðslu av Bernhardi Wilkinson høvdu framført í Norðurlandahúsinum. Tey bæði sungu hvør sær, og talan var um tvey heilt ymisk sløg av operasangi, ið tey bæði framførdu.

### Susanne tók øll á bóli

Tað var Rúni Brattaberg, ið legði fyri. Hansara sangur var framførdur á einum slagi av einum norrønum máli, sum var ógvuliga mystiskt og hugtakandi, sum onkur kønur málbar seg eftir konsertina.

Undan framførsluni hjá Rúna greiddi Árni Dahl, málfrøðingur, frá sanginum hjá Rúna, og hvat ið verkið var um. Um framførsluna hjá Rúna Brattaberg er at siga, at hon livdi upp til tað, ið fólk væntaðu. Talan var tó ikki um traditionella operu, men heldur um nýtt og eksperimenterandi tilfar, ið brýtur eitt sindur frá tí klassiska.

Tá ið Rúni var liðugur við sína framførslu, trein kona hansara, Susanne, á pallin. Nú skifti stílurin fullkomiliga, og áhoyrarafjøldin slapp at hoyra tann kenda og populera operatónleikin við brotum úr eitt nú Carmen. Í mun til Rúna visti føroyska áhoyrarafjøldin ikki, hvat ið væntast kundi av Susanne, men tað er neyvan at taka munnin ov fullan at siga, at hon fullkomiliga tók øll á bóli. Umframt at syngja framúr væl, dugdi Susanne Brattaberg eisini ómetaliga væl at framføra, og hon livdi seg inn í sangin við bæði rørslum og framburði. At áhoyrararnir dámdu væl framførsluna hjá Susanne var eisini sjón fyri søgn, tí hon bleiv klappað inn aftur á pallin fleiri ferðir.

Sum áðurnevnt var tað Føroya Symfoniorkestur undir leiðslu av Bernhardi Wilkinson, ið spældi undir, og fleiri tónleikakøn vildu verða við, at talan var um eina tað bestu framførsluna hjá orkestrinum nakrantíð. Ikki minst var tað stuttligt at síggja orkesturleiðaran, Bernhard Wilkinson, sum veruliga livdi seg inn í hvønn einstakan sang.

### Nærkast endanum

Konsertin við teimum báðum Rúna og Susanne Brattaberg var ein partur av árligu Listastevnuni, sum nú nærkast endanum.

Um vikuskiftið hevur Annika Hoydal tvær konsertir í Sjónleikarahúsinum, og Pipar og Salt fara at hava fleiri framførslur fyri fullum húsum í Norðurlandahúsinum næstu dagarnar.

Einrøðuleikurin Sellofan er framvegis á skránni á Meiarínum, og higartil hevur hvør einasta sýning verið útseld.

Leygarkvøldið verður skipað fyri dansinátt við føroyskum dansi í Gistingarhúsinum í Øravík, og kórið Ljómur úr Vági hevur konsert í Listaskálanum í Havn og Fríðrikskirkjuni á Toftum leygardagin.

Tá ið vikuskiftið er farið aftur um bak, er skráin fyri hesa Listastevnuna tó liðug, og fólk noyðast at brynja seg við toli til komandi ár.

# Ítróttarrørslan stendur ov spjadd

**– ÍSF megnar ikki nóg væl at virka fyri felagsítróttaligum áhugamalum. Tí skal felagsskapurin styrkjast umsitingarliga og fakliga. Ein liður í at bøta um hetta er at taka lut í altjóða samstarvi – tí eiga Føroyar at átaka sær at skipa fyri Oyggjaleikunum í 2015, heldur arbeiðsbólkur, sum hósdagin lat mentamálaráðharranum álit um ítróttarpolitikk**

ÍTRÓTTARPOLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*Eirikur@sosialurin.fo*




Hósdagin fekk Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, eitt álit um almennan ítróttapolitikk, sum arbeiðsbólkur við umboðum fyri Mentamálaráðið og Ítróttasamband Føroya hevur skrivað.

Ítrótturin hevur ómetaliga stóran mentanarligan og samfelagsligan týdning. Landsstýrismaðurin í mentamálum setti tí á sumri 2003 arbeiðið í gongd at orða ein almennan ítróttapolitikk.

Umframt at lýsa, hví tað er umráðandi við virknum og miðvísum almennum ítróttapolitikki, skuldi arbeiðsbólkurin lýsa støðuna hjá ítróttinum í Føroyum í dag sum heild, og greina framtíðarvisjón og menningarætlan fyri almenna ítróttapolitikkin.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið Katrin Joensen og Sølvi Reinert Hansen fyri ÍSF, og Jóan Petur Hentze fyri Mentamálaráðið.

Arbeiðsbólkurin metir vera av stórum týdningi, at gongd nú verður sett á eitt veruligt og støðugt ítróttapolitiskt kjak.

Høvuðsniðurstøðan í álitinum er, at føroyska ítróttarørslan stendur ov spjadd, og at ÍSF sum yvirskipaður og savnandi landsfelagsskapur fyri føroyskan ítrótt undir núverandi skipan ikki megnar at virka fyri felagsítróttaligu áhugamálunum í nóg stóran mun, og harvið at standa fyri eini støðugari menningartilgongd hjá ítróttinum sum heild.

Tað er tí neyðugt, at ÍSF verður styrkt umsitingarliga og fakliga. Arbeiðsbólkurin vísir í hesum sambandi á, at ÍSF í samstarvi við ymsu sersambondini eigur at skipa umstøður fyri virknari og áhaldandi føroyskari luttøku og sjónliggering í altjóða samstarvinum umframt at skipa fyri miðsavnaðari førleikamenning.

Ein liður í menningartilgongdini er, at Føroyar átaka sær at skipa fyri Oyggjaleikum aftur. Hóskandi høvi til hetta er 2015. Heldur enn eitt avmarkað mál í sær sjálvum, skulu Oyggjaleikirnir brúkast sum partur av einari miðsavnari menningtilgongd innan føroyskan ítrótt.

Tað er ítrótturin sjálvur, ið hevur ábyrgdina av at seta út í kortið tey ítøkiligu langtíðarmálini fyri ítróttaliga virksemið og menningina av hesum. Um hesi mál skulu røkkast er neyðugt, at samstarv verður skipað millum ÍSF og sersambond tess og almennu og kommunalu myndugleikarnar. Tí er eisini neyðugt, at politisku myndugleikarnir seta orð á, hvørji mið og mál almenni stuðulin til ítrótt skal hava, verður sagt í álitinum.